## Prógvið lítið at siga

Sammbært eini kanning hjá Analyse Danmark, er eitt gott prógv frá læristovni langt ífrá nakar garantur fyri einum góðum starvi. Greiningin vísir, at tað bert er í 6,6% av starvssetanunum, at prógvið vigar mest. Hugtakið "rættir førleikar" var týdningarmesta orsøkin í flestu av førunum, og eftir hetta vóru "góð kemi" og "góð sambond" næst fremstu orsøkirnar. Kanningin sýnir eisini, at nærum helmingurin av starvssøkjandi nýta sítt persónliga netverk, tá søkt verður um nýtt starv.

## Coaching í Vinnuhúsinum

Vinnuhúsið heldur hesar dagarnar skeið um coaching av starvsfólkum. Fremsta málið er her at eggja og leiða starvsfólki, soleiðis at evnini hjá hesum verða troytt á skilabestasn hátt í gerandisdegnum. Hartil skal leiðarin helst eisini fáa nøkur amboð, har tað í størri mun ber til at geva starvsfólkunum ta fatan, at leiðarin er gevandi fyri tey.

# skapinum?





*Fleiri áhugaverdir fyrilestrar vórðu hildnir á Vinnuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum um upplivingarbúskap*



klisjeir av um at finna eina javnvág millum arbeiði og lívið. At finna niður aftur í ferð, fyri so at gerðast enn meiri skapandi.

### Kjak um upplivingar-búskap

Við hendan dagin var so ein Pallborðsfundur við kendum føroyingum. Hvat skulu vit sum føroyingar gera við hesar nýggju treytirnar á alheimsmarknaðinum – hvussu kunnu vit brúka upplivingarbúskap til í Føroyum? Hetta var evnið, sum pallborðsfundurin skal viðgera – umframt at taka saman um og perspektivera tað, sum dagsins fyrilestrahaldarar høvdu borið fram.

Pallborðsluttakarar vóru m.a. Jón Tyril, leiðari av G-festivalinum í Gøtu, Steintór Rasmussen, fyriskipari av Summarfestivalinum í Klaksvík, Eirikur á Húsamørk, stjóri fyri nýhugsandi fyritøkuna Faroe Marine Products, sum var ársins virki í 2005, Óli á Deild Olsen, blaðstjóri á Vinnuvitan, sum var ársins átak í 2006, Guðrun Ludvig frá Guðrun & Guðrun, Kim Simonsen høvundur og blaðstjóri umframt onnur. Katrin Petersen, fyriskipari av MjúS-festivalinum á Sandi og fyrrverandi leiðari á tíðindadeildini í Sjónvarpi Føroya, var orðstýrari.

Her var eg sjálvur við í pallborðinum, so eg skal ikki meta um hvat kom burtur úr.

### Ein góður dagur

Hendan dagin vóru nógvir spurningar frammi, kanska heldur færri svar.

Eingin veit t.d. um Rich. Florida kann brúkast t.d. í Føroyum, kann mann hugsa, t.d. at Havnin vinnur á Klaksvík t.d., tí hon er meiri opin, stór og har er nærum gjørligt at liva meiri anonymt sum útlendingur og annað? Men Føroyar eru fjaskotnar. Landið noyðist at innflyta hvørja keks. Vit duga ikki at framleiða nakað, enn ikki sprutt, sum vit innflyta frá Danmark.

Kanska skal man síggja Flordia í einum øðrum høpi enn avmarkaðan til Føroyar, altso, at tey kreativu frávelja Føroyar, men velja at fara til Keypmannahavnar, men hvat er tað sum stórbýir kunna? Hví búgva 22.000 føroyingar í Danmark, serliga í Keypmannahavn?

### Eru Føroyar ein provins?

Føroyar skulu kanska skiljast og granskast sum ein provins, sum ein drenað provins (í provinsini í Dk. búgva heldur ikki onnur enn heilt ung, og etableraði pør í perselhúsum) til Danmark.

Útheimurin fær okkara ungu (frá 20 til 30ár aldur serliga), okkara kreativu, okkara samkyntu, okkara listafólk, okkara kritikarar, okkara intellektuellu, nógvar av okkara kvinnum - og ja tey flestu koma ikki aftur, ella aftur at etablera seg við 2 arbeiðum, húsi og 2 børnum í Havn.

Millum hesar bólkar (heimabúgvandi føroyingar og útisetar) er eitt helgens rok mangan, tey "ónøgdu" kunnu bæði vera tey heima og tey sum eru "heima" úti. Trúgvi at hetta forholdið er nakað tað sama sum tey sum koma frá Sønderborg (men sum búgva í Keypmannahavn) hava yvir fyri heimbýnum. Og tey frá Sønderborg hava eisini svakligar fordómar móvegis stórbýinum Keypmannahavn.

Føroyar eru um at enda (eru kanska endaði) sum eitt suburbia - ein forstaður og ein provins til keativar býir sum Kbh. og metropolar sum London. Hetta er helst ein tend sum bert fer at akselerera púra svakt framyvir.